# Johan á talvuna í Horsens

**Horsens er á veg ímóti uppflyting, meðan tað hjá Frem, sum aftur hesa ferð bara fekk eitt stig, tykist síggja svartari út**

DANMARK
1./2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað gongur strúkandi hjá Horsens og Johan B. Hansen. Hesa ferð høvdu teir vitjan av Brønshøj, og høvuðsstaðarliðið varð sent til hús aftur við 3-0 tapi í viðførinum. Johan B.Hansen er fastur maður á Horsens liðnum, og hesa ferð var tað føroyski landsliðsspælarin, sum setti hol á málskjótingina. Tað gjørdi hann, tá ið ein hálvur tími var farin.

Horsens er oddalið í næstbestu deildini. Teir eru átta stig frammanfyri triði fremsta liðið, sum er Frem, og tað skal vilja meiri enn illa til, um Horsens eftir summarsteðgin ikki fer at verða partur av bestu deildini.

Hjá hinum føroysku feløgunum hilnaðist tað ikki væl. Glottin er, at føroysku landsliðsspælararnir, Andrew av Fløtum í Fremad Amager og Jón Rói Jacobsen í Frem, eru fast inventar á liðunum.

Frem var á útivølli á Gentofta Stadion, har HIK megnaði 1-1 ímóti teimum. Frem hevði bóltin størsta partin av tíðini, men teir megnaðu ikki at fáa mál, og so gjørdist tað serliga strevið, tá ið heimaliðið fyrst skoraði.

Í fyrstu umførunum eftir vetrarsteðgin hevur tað ikki hilnast væl hjá Frem, og nú tykist møguleikin fyri uppflyting at vera lítil.

Sønderjyske er næstfremst. Hesa ferð áttu teir heimavøll ímóti Vejle. Nógv er broytt í jyska fótbóltinum. Tað er ikki so langt síðani, at Vejle var millum flaggskipini, meðan Haderslev og Suðurjylland sum heild vóru í lægru deildunum. Sønderjyske var sannførandi, og teir vunnu 4-0 á Vejle.

Fremad Amager var í Ølstykke, og teir taptu 1-0. At Ølstykke framvegis hevur tikið á Fremad Amager noyddist fyrrverandi Ølstykke venjarin, Benny Johansen, sum nú hevur ábyrgdina av Fremad Amager, at sanna.

## Christian vandamikil

Í triði bestu deildini hilnaðist tað væl bæði hjá Lyngby og Christian Lamhauge Holst og hjá Holstebro og John Petersen. Talan var um botnuppgerð, tá ið Holsterbro vitjaði í Værløse. Holsterbro vann 2-0. John Petersen taldist ikki millum málskjúttarnar hesa ferð.

Hóast teir vunnu øll stigini, so eru teir í Holsterbro framvegis í vanda fyri at missa plássið í deildini.

Lyngby átti heimavøll ímóti Aarhus Fremad. Eingin ivi var um styrkismunin. Lyngby vann 5-0, og Christian Lamhauge Holst, sum hevur roynt seg á føroyska landsliðnum, skaraði framúr sum málskjútti. Hann skoraði trý mál — til 1-0 í 15. minutti, til 3-0 í 51. minutti og til 3-0, tá ið tað restaði eitt korter.

Á støðutalvuni bendir einki á, at Lyngby skal fara nakran veg — hvørki uppeftir ella hinvegin.

# Todi skoraði tvey mál

**Tvey mál á næstbesta liðnum roknar hann við styrktu um hansara støðu, men hann roknar ikki við, at støðan fer at broytast næstu vikurnar**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Tað vóru sunnudagin glottar í troystarleysa fótbóltslívinum hjá Toda Jónsson í Keypmannahavn. Enn eina ferð hevði Hans Backe vrakað føroyska álopsspælaran, tá ið besta liðið undan ferðini til Odense skuldi mannast.

Luturin hjá Toda var saman við trimum øðrum av besta liðnum at spæla við Danmarksseriuliðnum, sum á heimavøllinum á Frederiksberg stadion spældi toppdyst ímóti AB70. Reglurnar eru broyttar, so næstbestu liðini hjá teimum í superliguni kunnu flyta upp í 2. deild, og í FCK vilja teir fegnir hava eykaliðið at flyta upp.

Todi Jónsson var á vøllinum í 70 minuttir. So bað hann um at verða skiftur út. Tað kundi hann gera við góðari samvitsku, tí hann hevði fyrra partin av seinna umfarinum skorað tvey mál. Tað fyrra stútaði hann eftir frísparksinnlegg, og tað seinna fekk hann, eftir at hann hevði sneitt seg leysan.

- Tað er sjálvandi stórur munur á at spæla í superliguni og í Danmarksseriuni. Og upp á ein máta er tað torførari á hesum støðinum. Mótstøðumenninir kenna okkum, sum plaga at spæla í superliguni, og teir leggja nógv fyri. Taklingarnar eru ikki altíð so reinar, og viðhvørt eru teir eitt sindur seinir, so tú kennir vandan fyri skaðum at vera kanska størri, enn hann er í superliguni.

*Broytir tað tína støðu, at tú hesa ferð skoraði tvey mál?*

– Eg haldi, at tað styrkir mína støðu, men eg rokni ikki við, at tað fara at vera serligar broytingar. Í langa tíð havi eg nú verið fimta val til tey bæði álopsplássini, og tað gangi eg bara út frá eisini fer at verða soleiðis tær næstu vikurnar. Men vit fáa at síggja.

*Ert tú nøgdur við tað?*

– Tá ið tú í mong ár hevur spælt á hægsta støði, so kennist tað sjálvandi ikki serliga hugaligt at spæla seriufótbólt. Men soleiðis er støðan í løtuni, og tað eri eg noyddur at arbeiða út frá.

*Fert tú at halda fram í FCK næsta ár?*

– Sáttmálaskeiðið verður runnið í summar. Fyri jól gjørdu vit av at bíða við at tosa saman um møguleikan fyri framhaldandi samstarvi inntil eina ferð seinni í vár. Eg veit ikki, um FCK er áhugað í at halda fram við samstarvinum. Um teir eru tað, so er tað upp til mín at gera av, um eg skal vera nøgdur við at halda fram sum eykaspælari fyri eykaspælararnar, ella um eg skal flyta til annað felag, har er rokni við at møguleikarnir fyri plássi á besta liðnum verða størri, enn teir í løtuni tykjast at vera her, sigur Todi Jónsson.

## Danska superligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brøndby (S) | 21 | 13 - 6 - 2 | 32 | 12 | 20 | 45 |
| 2 | FCM | 21 | 11 - 4 - 6 | 30 | 28 | 2 | 37 |
| 3 | FCK (M) | 21 | 10 - 6 - 5 | 39 | 28 | 11 | 36 |
| 4 | Viborg | 21 | 9 - 7 - 5 | 26 | 21 | 5 | 34 |
| 5 | OB | 21 | 9 - 4 - 8 | 43 | 26 | 17 | 31 |
| 6 | AaB | 21 | 8 - 5 - 8 | 33 | 29 | 4 | 29 |
| 7 | AGF | 21 | 8 - 5 - 8 | 34 | 35 | -1 | 29 |
| 8 | Esbjerg | 21 | 7 - 6 - 8 | 37 | 33 | 4 | 27 |
| 9 | Silkeborg | 20 | 7 - 3 -10 | 31 | 37 | -6 | 24 |
| 10 | FC Nordsj. | 20 | 4 - 5 -11 | 23 | 39 | -16 | 17 |
| 11 | Randers FC | 20 | 4 - 5 -11 | 21 | 38 | -17 | 17 |
| 12 | Herfølge | 20 | 4 - 4 -12 | 16 | 39 | -23 | 16 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

## Danska 1. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | AC Horsens | 18 | 14 - 2 - 2 | 38 | 13 | 25 | 44 |
| 2 | Sønderjyske E | 17 | 11 - 3 - 3 | 47 | 20 | 27 | 36 |
| 3 | Frem | 19 | 10 - 6 - 3 | 40 | 17 | 23 | 36 |
| 4 | Køge | 18 | 9 - 6 - 3 | 40 | 22 | 18 | 33 |
| 5 | HIK | 18 | 9 - 4 - 5 | 33 | 24 | 9 | 31 |
| 6 | Fredericia | 18 | 7 - 7 - 4 | 31 | 23 | 8 | 28 |
| 7 | Fremad Amager | 18 | 7 - 6 - 5 | 28 | 18 | 10 | 27 |
| 8 | Vejle | 17 | 8 - 3 - 6 | 37 | 30 | 7 | 27 |
| 9 | Skjold | 18 | 7 - 4 - 7 | 25 | 30 | -5 | 25 |
| 10 | AB | 16 | 6 - 3 - 7 | 30 | 30 | 0 | 21 |
| 11 | NFA | 17 | 5 - 3 - 9 | 31 | 41 | -10 | 18 |
| 12 | Næstved | 18 | 5 - 2 -11 | 20 | 40 | -20 | 17 |
| 13 | Brønshøj | 17 | 4 - 4 - 9 | 25 | 37 | -12 | 16 |
| 14 | Ølstykke | 19 | 4 - 3 -12 | 26 | 54 | -28 | 15 |
| 15 | B 93 | 18 | 2 - 5 -11 | 29 | 48 | -19 | 11 |
| 16 | Dalum | 18 | 3 - 1 -14 | 30 | 63 | -33 | 10 |

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen (Frem), Andrew av Fløtum (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

## Danska 2. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kolding FC | 18 | 13 - 0 - 5 | 33 | 21 | 12 | 39 |
| 2 | Brabrand | 17 | 12 - 2 - 3 | 40 | 19 | 21 | 38 |
| 3 | Lyngby | 16 | 10 - 1 - 5 | 40 | 20 | 20 | 31 |
| 4 | Holbæk | 17 | 9 - 4 - 4 | 31 | 20 | 11 | 31 |
| 5 | Jetsmark | 18 | 9 - 3 - 6 | 43 | 32 | 11 | 30 |
| 6 | Glostrup | 16 | 9 - 3 - 4 | 36 | 26 | 10 | 30 |
| 7 | Slagelse | 17 | 8 - 5 - 4 | 32 | 19 | 13 | 29 |
| 8 | Næsby | 17 | 7 - 3 - 7 | 27 | 24 | 3 | 24 |
| 9 | FC Roskilde | 16 | 7 - 0 - 9 | 21 | 30 | -9 | 21 |
| 10 | B 1909 | 17 | 5 - 5 - 7 | 14 | 22 | -8 | 20 |
| 11 | Aarhus Fremad | 16 | 5 - 3 - 8 | 25 | 27 | -2 | 18 |
| 12 | B 1913 | 16 | 4 - 5 - 7 | 23 | 31 | -8 | 17 |
| 13 | Hjørring | 17 | 3 - 6 - 8 | 19 | 27 | -8 | 15 |
| 14 | Holstebro | 18 | 4 - 2 -12 | 23 | 41 | -18 | 14 |
| 15 | Værløse | 17 | 4 - 1 -12 | 19 | 50 | -31 | 13 |
| 16 | Kalundborg | 17 | 3 - 3 -11 | 26 | 43 | -17 | 12 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby), John Petersen (Holstebro)

## Enska Premier League

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Chelsea | 31 | 25 - 5 - 1 | 61 | 11 | 50 | 80 |
| 2 | Arsenal | 31 | 20 - 7 - 4 | 72 | 33 | 39 | 67 |
| 3 | Manchester Utd. | 31 | 19 -10- 2 | 48 | 17 | 31 | 67 |
| 4 | Everton | 31 | 15 - 6 -10 | 35 | 33 | 2 | 51 |
| 5 | Liverpool | 31 | 15 - 5 -11 | 44 | 31 | 13 | 50 |
| 6 | Bolton | 31 | 13 - 7 -11 | 38 | 35 | 3 | 46 |
| 7 | Middlesbrough | 31 | 12 - 9 -10 | 45 | 42 | 3 | 45 |
| 8 | Charlton | 31 | 12 - 8 -11 | 37 | 44 | -7 | 44 |
| 9 | Tottenham | 31 | 12 - 7 -12 | 38 | 35 | 3 | 43 |
| 10 | Aston Villa | 31 | 11 - 8 -12 | 37 | 39 | -2 | 41 |
| 11 | Newcastle | 30 | 9 -11-10 | 41 | 48 | -7 | 38 |
| 12 | Manchester City | 31 | 9 -10-12 | 37 | 36 | 1 | 37 |
| 13 | Birmingham | 31 | 9 - 9 -13 | 34 | 38 | -4 | 36 |
| 14 | Fulham | 30 | 9 - 6 -15 | 36 | 48 | -12 | 33 |
| 15 | Blackburn | 31 | 7 -12-12 | 25 | 37 | -12 | 33 |
| 16 | Portsmouth | 31 | 8 - 7 -16 | 33 | 49 | -16 | 31 |
| 17 | Southampton | 31 | 5 -12-14 | 34 | 48 | -14 | 27 |
| 18 | WBA | 31 | 5 -12-14 | 30 | 51 | -21 | 27 |
| 19 | Crystal Palace | 31 | 6 - 8 -17 | 33 | 50 | -17 | 26 |
| 20 | Norwich | 31 | 3 -11-17 | 30 | 63 | -33 | 20 |

## Enska League Championship

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Sunderland | 40 | 25 - 6 - 9 | 67 | 35 | 32 | 81 |
| 2 | Wigan | 40 | 22 -10- 8 | 71 | 32 | 39 | 76 |
| 3 | Ipswich | 40 | 22 -10- 8 | 72 | 46 | 26 | 76 |
| 4 | Preston | 40 | 18 -11-11 | 56 | 51 | 5 | 65 |
| 5 | Reading | 40 | 16 -13-11 | 44 | 35 | 9 | 61 |
| 6 | Derby | 39 | 17 -10-12 | 58 | 50 | 8 | 61 |
| 7 | West Ham | 39 | 17 - 8 -14 | 55 | 50 | 5 | 59 |
| 8 | Sheff Utf. | 39 | 16 -11-12 | 47 | 47 | 0 | 59 |
| 9 | QPR | 39 | 16 - 8 -15 | 48 | 49 | -1 | 56 |
| 10 | Millwall | 40 | 15 -10-15 | 42 | 38 | 4 | 55 |
| 11 | Stoke | 39 | 15 -10-14 | 30 | 30 | 0 | 55 |
| 12 | Leeds | 40 | 13 -15-12 | 45 | 43 | 2 | 54 |
| 13 | Wolverhampton | 40 | 11 -19-10 | 59 | 53 | 6 | 52 |
| 14 | Burnley | 39 | 13 -13-13 | 33 | 35 | -2 | 52 |
| 15 | Leicester | 38 | 10 -17-11 | 42 | 39 | 3 | 47 |
| 16 | Crewe | 40 | 11 -13-16 | 58 | 71 | -13 | 46 |
| 17 | Watford | 40 | 10 -15-15 | 48 | 54 | -6 | 45 |
| 18 | Plymouth | 40 | 12 - 9 -19 | 47 | 59 | -12 | 45 |
| 19 | Coventry | 40 | 11 -11-18 | 49 | 63 | -14 | 44 |
| 20 | Brighton | 40 | 12 - 8 -20 | 34 | 57 | -23 | 44 |
| 21 | Cardiff | 39 | 10 -13-16 | 40 | 43 | -3 | 43 |
| 22 | Gillingham | 40 | 11 -10-19 | 39 | 59 | -20 | 43 |
| 23 | Notm Forest | 39 | 8 -15-16 | 37 | 55 | -18 | 39 |
| 24 | Rotherham | 40 | 5 -13-22 | 32 | 59 | -27 | 28 |

Føroyskir leikarar: Claus Bech Jørgensen (Coventry)